# Føroya Banki 100 ár



*Føroya Banki hevði fingið donsku skemtararnar Finn Nørbygaard og Jacob Haugaard at undirhalda hetta kvøldið. Teir vóru á pallinum eftir steðgin, og teirra framførsla var sera góð.*

**Yvir 700 fólk vóru savnað til stórt gallakvøld á Tvøroyri sunnukvøldið, har Føroya Banki hátíðarhelt 100 ára føðingardagin hjá bankanum. Salt, Brekku Brothers og Lena Andersen syrgdu fyri tónleikinum, meðan Føroya Banki hevði fingið so navnframar menn sum Jacob Haugaard og Finn Nørbygaard at standa fyri undirhaldinum**

VINNUSÍÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tann 1. mars 2006 vóru 100 ár liðin síðani Føroya Banki varð settur á stovn. Hann hevur líka síðani verið partur av føroyska bankaheiminum, men tó ikki einsamallur. Sjóvinnubankin varð stovnaður tann 6. mars 1932. Aðrir bankar hava verið við í kappingini um bankaheimin eisini. Eftir djúpu búskaparkreppuna í 1990'unum vórðu teir báðir stóru bankarnir lagdir saman, navnið á samanlagda bankanum gjørdist Føroya Banki við búmerkinum hjá Sjóvinnubankanum.

Í samband við at Føroya Banki fyllir 100 ár, hevur bankin valt at skipa fyri fleiri stórum gallakvøldum kring landið, og fyrsta av hesum gallakvøldum var á skránni sunnukvøldið, tá yvir 700 fólk vóru komin saman í høllini í Trongisvági.

### Gott undirhald undan steðginum

Bogi Andreasen og Synergi hava havt høvuðsábyrgdina av at leggja alt tiltakið til rættis, men umleið 100 fólk hjálpa til fyri at fáa alt at hanga saman. Hotel Føroyar hevði gjørt matin, og alt tiltakið vardi í tríggjar tímar.

Johnny í Grótinum, leiðari á menningardeildini í Føroya Banka, heldur, at tiltakið riggaði ótrúliga væl.

- Tiltakið var sera væleydnað. Alt gekk eftir ætlanini, og eg haldi, at gestirnir vóru sera væl nøgdir eftir tiltakið.

Uni Arge, samskiftisráðgevi bankans, og Óluva Zachariasen vóru frásøgufólk á gallakvøldinum, sum var skipað í tveimum pørtum. Fyrst komu fólk inn í høllina, og har var alt pyntað í lilla, og tveir stórskíggjar vóru settir upp, so at fólk betri kundi fylgja við í tí, sum fór fram. Í fyrra partinum var gott undirhald á skránni. Kvøldið byrjaði við einum trummushowið stjórnað av Una Debes og Bjarka Meitil, har nakrir dansarar úr fimleikafeløgunum í Havn og Runavík framførdu ein dansileik.

- Eg helt hetta vera eina góða byrjan uppá kvøldið. Góður tónleikur, tá vit komu inn, og so dugdu hasar genturnar veruliga væl at dansa. Trummushowið hjá Una Debes var eisini sera stórsligið, sigur Johnny í Grótinum.

Eftir eina undirhaldandi byrjan við nógvum lívi, dansarum og trummum, so bleiv ein filmur vístur á stórskíggja. Hesin filmurin var fyrsti av trimum hetta kvøldið, og hesin parturin var um søguna hjá Føroya Banka og Sjóvinnubankanum fram til seinna veraldarbardaga.

Júst eftir filmin spældi bólkurin Salt tveir sangir. Salt var ein góð uppliving. Tey sungu tveir sangir. Ein friðarligan sálm, og so ein eitt sindur villari sang.

Tá Salt hevði verið á pallinum, bleiv næsti filmurin vístur. Hesin var um



*Kvøldið byrjaði við einum góðum trummushowið, sum Uni Debes stjórnaði*



*Stjórar og starvsfólk í Føroya Banka taka ímóti gestum í høllini í Trongisvági*